## Contador ræðist Andy

Var hart stríð í fjør millum Alberto Contador og Lance Armstrong, hóast í Tour de France-kappingini vóru á sama liði, verður tað ikki frægari í ár, nú teir ikki longur eru tað. Men vinnarin í fjør, Contador, ræðist tó ikki Armstrong mest, men er nógv bangnari fyri Andy Schleck. – Av teimum mongu, eg kappaðist við, var hann tann, ið andlit til andlits gav mær størst trupulleikar, sigur Contador.




## Stórlið missir stuðul

Eitt av stóru súkkluliðunum, Caisse d'Epargne, noyðist næsta ár at skifta navn, tí høvuðsstuðulin við sama navni tá gevst at stuðla liðnum. Í løtuni er størsta stjørnan á liðnum, spanski súkklarin, Alejandro Valverde, miðdepil í einum dopingmáli, men Caisse d'Epargne vil ikki siga, um tað er orsøkin til uppsagda sáttmálan. Í staðin fer bankin nú at stuðla fronsk OL-lið í Vancouver og London.

# í sær





Fríggjakvøldið vandu Poul-Erik Høyer Larsen og Finn Trærup saman við fleiri av okkara bestu badmintonspælarum, ið royndu at taka til sín av tí nógva, hesir báðir høvdu at læra frá sær

Mynd: Álvur Haraldsen

Poul-Erik Høyer Larsen var væl kunnaður um, hvar føroyskt badminton er í dag, og millum annað kom hann sjálvur inn á Oyggjaleikirnar í Álandi í fjørsummar, sum gjørdust eitt slag av einum gjøgnumbroti hjá føroyskum badminton, tá tað eydnaðist at vinna trý gullmerki, eitt silvurmerki og eitt bronsumerki, sum er nógv frægasta føroyska úrtøkan nakrantíð á Oyggjaleikunum.

– Hetta prógvar, at tit eru á rættari leið og hava framgongd, og eg havi sjálvur upplivað hesar dagarnar, at tit hava gávaðar og evnaríkar spælarar, sum bæði kropsliga og tekniskt eru sera væl við. Sjálvandi fáa tit illa sammett tykkum við Danmark, men kanska tit kunnu sammeta tykkum við Ísland, sum í fleiri ár hevur staðið seg rættiliga væl, segði hann.

– Eg vóni, at vit koma at síggja ein føroyskan spælara á europeiskum úrvalsstigi, og eg haldi, at tit hava potentiali til tað, hóast tit bara eru 48.000 fólk her. Við tí fólkagrundarlagi, tit hava í Føroyum, stendur sera væl til við góðum badmintonspælarum.

Sjálvur var Poul-Erik Høyer Larsen úrvalsítróttarfólk í mong ár, men hann sigur, at hann var í tí hepnu støðu, at Danmark sum oftast stóð seg so mikið væl, at fleiri danskir spælarar við til tær stóru kappingarnar. Tað kendist ikki so einsligt, sum tað annars kann gera, tí tey hildu væl saman og bygdu upp ein góðan liðanda sínamillum.

– Ein føroyskur toppspælari skal sjálvandi ikki rokna við, at hann hevur eitt heilt lið aftur at sær, men tá kundi tað verið uppgávan hjá okkum øðrum, eitt nú Danmark og Íslandi, at slúsa føroyingin inn í ein góðan felagsskap, sum hann veruliga kendi seg sum part av, sigur hann.

– Nú hava vit so verið her og sæð, hvussu tit hava tað, so vit kenna til tykkara umstøður. Kemur ein føroyskur spælari so langt, at hann røkkur europeisku elituna, vilja vit fegin rætta eina hjálpandi hond. Tað hevði verið deiligt, tí – sum sagt – so hava tit potentiali til at røkka longur fram á leið, sigur hann

### Seta sær smá mál

Áðrenn Poul-Erik Høyer Larsen slapp at rinda møðina eftir langa venjingarkvøldið, vildu vit hava hann at taka eitt burtur úr rúgvuni av tingum, sum hann heldur vera serliga avgerandi hjá einum úrvalsítróttarfólki at hava í huga.

– Ja, skal eg nevna eitt fram um nakað annað, so er tað, at tú mást alla tíðina hava motovatiónina venda ímóti tí næsta, tú skalt røkka í menningini. Tað er neyðugt við einari menningartilgongd, har tú alla tíðina hugsar um næsta stigið og so aftur næsta stigið. Tá er umráðandi, at tú ikki setir tær mál, ið liggja ov langt frá tær, men heldur stutt mál, ið tú veitst, at tú kanst røkka, sigur hann, áðrenn hann hevur hug at leggja eitt aftrat:

– Tað er, at tú eisini alla tíðina mást syrgja fyri, at tú varðveitir tína egnu persónligheit. Tað hevur eisini sera stóran týdning.

### FAKTA

Poul-Erik Høyer Larsen, 44 ár, vann í 90-unum hópin av sigrum í stórum altjóða kappingum. Hann var tvær ferðir við til Olympisku Leikirnar, har hann fyrst kom í fjórðingsfinaluna í Barcelona í 1992 og síðani vann gull í Atlanta í 1996. Hann vann All-England í 1995 og 1996, og var europameistari í 1992, 1994 og 1996. Haraftrat var hann danskur meistari í 1989, 1995, 1996 og 1998, og vann Danish Open í 1988, 1990, 1993, 1994, 1995 og 1999. Síðstu tvey árini hevur hann verið næstformaður í danska badmintonsambandinum, og nýliga gjørdist hann 25. limurin í donsku »Hall of Fame«.

# Ótrúliga gevandi

**– Alt tað, vit hava lært frá hesum báðum monnunum, kann verða sum ein kelda, ið fer at spríkja næstu venjingarvikurnar, sigur Absalon Eysturoy, sum var við til venjingina í Badmintonhøllini fríggjakvøldið**


einsistir@kallnet.fo



Hilmar Jan Hansen


Ein av okkara fremstu badmintonspælarum, 31 ára gamli Absalon Eysturoy, var tannáringur, tá Poul-Erik Høyer Larsen var upp á tað besta og vann allar tær stóru kappingarnar. Og hóast Absalon ikki sigur seg vera so áhugaðan í idolum, so viðurkennir hann, at danski badmintonspælarin uttan iva er ein fyrimynd – umframt at øll kenna navnið og úrslitini hjá honum.

– Tað var ótrúliga gevandi at venja saman við honum og Finn Trærup-Hansen, tí hetta er á donskum landsliðsstigi, so her er ein rúgva, vit kunnu taka við okkum og brúka, sigur Absalon, ið ikki minst var hugtikin av, hvussu venjingarnar verða bygdar upp.

– Vit fingu nógvan og góðan íblástur frá smálutum, ið vit meira royndu kunnu fáa nakað burturúr. Men eisini komu teir við ymiskum smálutum í grundspælinum, ið kanska serliga koma teimum ungu væl við.

Absalon Eysturoy sigur, at tá tú hevur verið við í nøkur ár, so er tað gott at sleppa at læra nøkur nýggj ting, og her var hópin av slíkum. Somuleiðis er hann spentur at síggja, hvussu hesar venjingarnar fara at ávirka víðari gongdina hjá føroysku spælarunum.

– Her kann talan vera um at taka stór lop, tí her hava vit fingið bæði stóran íblástur og stóra vitan. Og tann keldan fer at spríkja næstu vikurnar, nú vit halda fram vit at venja til føroyameistaraheitið og aðrar komandi kappingar, sigur hann, áðrenn vit spyrja, um tað hevði verið eitt hugskot at fingið slíkar menn knýttar at fyrireikingunum til komandi Oyggjaleikir:

– Eg sigi bara, at so hevði tað ikki verið lukkuligt fyri hinar oyggjarnar. Tað hevði verið heilt ótrúligt, og so høvdu vit meira tilkomnu eisini fingið fleiri av teimum yngru spælarunum at tikið yvir okkara leiklut.